***Fundur Skúlastýrið og Kommunan um skúlagarð o.a. 29. nov. 2017 kl. 16.30***

Á fundinum: Vivi, Bjørg, Allan, Nina, Marjun, Gunvør, Jákup, Bergun, Bjørghild og Símun

Fundurin byrjar við framløgu av ætlanum. (MH) Síðani søgan um ánna, ið hvarv, og her byrjaði aftur arbeiðið við at fáa eitt rímiligt "uttanumhvørvi".

Skúlagarðurin ein katastrofa og foreldur vísa sína ónøgd.

- Og so søgan um hvussu vit hava fingið lovað og lova, uttan at nakað er hent. Enntá er *latin* játtan tikin aftur frá okkum.

Lítil, men bara lítil, uggi er í at kr. 900.000,- fara til eina borg omanfyri skúlan.

So varð prátað um "hovsaloysnina" við høllini, sum kom uttan at taka tey fyrilit, ið eiga at takast t.d. atkomuveg o.s.fr. – at vit "overnight" mistu Tváttá, uttan at vit á nakran hátt vóru kunnað. Tað kom fram at eingin í kommununi visti rættiliga hvat var hent...

Kunnað varð um ætlanina við økinum í skitsu frá Bárði.

Bølamyrkt at ganga til høllina - Jákup Dam segði at ljós eru ávegis.

Hann segði eisini at skaðin *var* hendur og at *tey* áttu ábyrgdina og vildu gera alt fyri at kompensera fyri skaðan. Og at hetta vóru øll í kommununi samd um.

Landslagsarkitektur hevur gjørt ætlan. Í januar tekur tekniska nevnd støðu.

Ein av niðurstøðunum er, at her er so gott sum einki náttúruøki eftir til skúlagarð.

Nógv tos um inngongd til høllina.

*Best er tó at bíða til alt økið er liðugt og ruddað – og so fara í gongd!*

Mælti Gunvør, nú tá ið høll og vergur eru liðug skulu bæði "Bygg og bý" og Mentamáladeildin inn yvir eina nýggja ætlan, sum fevnur um allan garðin, síðan verður tað tikið harífrá.

Í kommununi eru tey samd um at hetta er planloysi í stórum stíli. Og at vegføringin er illa umhugsað.

Leyst og fast tos.

Finnast økir, ið kunnu leggjast aftrat skúlagarðinum?

Prát um bussleiðina og steðgipláss – flytast yvir um vegin

Klubbatilboðið er eftir øllum at døma ikki til diskussión – hóast frárátt av skúlastýrinum.

Sundirskiljingin av høllini bleiv ikki, sum ætlað og lovað.

Prát um stórar/smáar flokkar og hertil óegnaðar skúlastovur (bert eitt lítið hol ímillum)

Jákup Dam vildi fegin hava tað vit eiga um bussleiðina/steðgipláss

Hansara meyladressa er: [jakupd@torshavn.fo](mailto:jakupd@torshavn.fo)

Fundur lokin uml. kl 17.30

sa